# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Gullbrúðarparið Óluvá og Herluf



27. mars 2007 kunnu Óluvá og Herluf Joensen halda gullbrúðardag. Tey giftust í Hvalvíkar kirkju.

Óluva er dóttur Sannu og Pól Andreassen av Oyrarbakka. Herluf er sonur Jóhannu og Jógvan Joensen av Heygnum í Hvalvík. Tey hava búð í Hvalvík øll árini, undantikið eina tíð við Gjógv og í Vík. Tey hava fýra synir, sum eru Jógvan Páll, Súni, Jeffri og Halldórur.

Herluf var maskinførari ein mansaldur og var tað hansara lívsstarv. Óluvá tók sær av heiminum og fór eisini út at arbeiða, sum børnuni vuksu til.

Vit synirnir eru vaksnir upp í einum heimi har mamman altíð var til staðar. Foreldur okkara havt bygt upp eina trygga rammu runt um okkara uppvøkstur og víðari framm, sum vit kunnu minnast væl og gleðiliga afturá.

Óluvá og Herluf hava eisini fingið átta ommu- og abbabørn, umframt ein langommu- og langabbason.

Tey halda dagin saman við synunum og familjum teirra. Vit fara at ynskja teimum hjartaliga tillukku við degnum og Guðs signing í framtíðini.

**Kærastu heilsanir**
**synirnir v/ fam.**

## Páll á Lakjuni 60 ár



Hósdagin 29. mars verður Páll á Lakjuni í Fuglafirði 60 ár. Føðingardagurin verður hildin mikukvøldið í Siloa í Fuglafirði.

Páll er fuglfirðingur. Foreldrini vóru Mia og Jákup Oluf á Lakjuni, sum bæði vóru úr Fuglafirði. Tey eiga 6 dreingir: Victor (45), Páll (47), Harry (49), Jógvan (52), Terji (55) og Eyðun (59). Victor býr í Klaksvík og hinir búgva í Fuglafirði.

17 ára gamal fór Páll í 1964 til Havnar í læru á Skattadeildini, sum tá var í Tinganesi. Har arbeiddi hann inntil í 1971.

Páll giftist 24. apríl 1971 við Hjørdis, sum er ættað úr Klaksvík. Foreldur hennara vóru Anna og Hans Jacob Justesen. Hon var úr Árnafirði, og hann úr Norðdepli. Hjørdis og tey búðu nógv ár norðuri á Strond, har pápi hennara arbeiddi á verkinum hjá SEV.

Eftir at Hjørdis og Páll vóru gift, fóru tey til Danmarkar, har tey vóru við í evangeliska verkinum í Operation Josva, sum hevði støð á Fyn og annars hevði átøk kring alt landið.

Í 1974 flutti Páll og familjan til Klaksvíkar at búgva. Hann arbeiddi á heilsøluni hjá Kjølbro í nøkur ár. Eftir at familjan var flutt til Fuglafjarðar, fór Páll at arbeiða hjá Haraldsen, og nú hevur hann í mong ár verið heilsølumaður.

Páll og Hjørdis eiga hugnaligt heim úti á land. Tey eiga 4 børn: Bogi (72), Maria (74), Ingun (78) og Oddur (82). Genturnar búgva í Klaksvík og dreingirnir í Fuglafirði. Páll eigur tvey abbabørn – eina gentu og ein drong.

Páll hevur góða sangrødd. Hann var tenorur í Ebenezerkórinum, og miðskeiðis í 60'inum fór hann saman við trimum øðrum ungum monnum at syngja við Sangbrøðrum. Sangurin og tónleikurin kendust tá at hava nýtt snið, og Sangbrøður vóru væl fagnaðir. 3 EP-plátur spurdust burtur úr, áðrenn teir góvust at syngja regluliga í 1971.

Síðani hann kom aftur til Fuglafjarðar, hevur Páll kent stóra ábyrgd í samkomuni í Fuglafirði. Hann hevur verið í Siloakórinum øll árini, og viðhvørt syngja og spæla Páll og beiggjarnir. Í samband við runda føðingardagin verður sangløta í Siloa mikukvøldið kl. 19, tá fara Siloakórið, Sangbrøður og brøðurnir á Lakjuni at syngja.

**J**

## Nýggir maskinistar fingið prógv

**PRÓGV**
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Mánadagin 19. mars fingu 17 maskinistar handað prógv á Vinnuháskúlanum í Havn. Talan er um tveir flokkar. Tann fyrri er fyri nýggjar maskininstar, meðan tann seinni er fyri royndar maskinpassarar, sum ikki hava havt neyðugu prógvini, men hava siglt við undantaksloyvi.

Sambært stjóranum á Vinnuháskúlanum, Hans Jóhannus á Brúgv, er ætlanin at gevast við at geva undantaksloyvi, so allir teir, ið sigla upp á slíkt, verða skúlaðir og fáa prógv uppá, at teir eru góðkendir sum maskinistar.

Stjórin sigur, at ætlanin er at taka ein nýggjan flokk inn í august, og tá hava væntandi allir teir, ið eftir eru, fingið prógv sum maskinistar.



*Hesir 10, umframt ein afturat, tóku prógv sum nýggir maskinistar mánadagin. Petur Olaf Berg í Lágabø, Bergleif Sólsker, Jógvan Christiansen, Ragnvald Joensen, Christian Martin Trondesen, Páll Larsen, Oddmar Pætur Niclasen, Sámal Jákup Isaksen, Petur Gardar Joensen og Torbjørn Pauli Sæbúð. Arnbjørn Bjarnason vantar á myndini*

*Mynd: Vinnuháskúlin*



*Hesir seks eru allir royndir motorpassarar, men hava siglt upp á undantaksloyvi. Nú hava teir allir prógv uppá, at teir eru maskinistar. Teir eru: Alex L. Johannesen, Hans Petur Hansen, Jákup Olsen, Theodor Vilhelmsen, Frank Syderbø og Joen Magnus Lamhauge*

*Mynd: Vinnuháskúlin*